

# Havfrú.

Havfrúgv líkist fólki fyri oman beltið, hevur langt jarpt hár sum kona; hon floytir tað ut um seg á sjógvin; tó hevur hon styttri armar. Fyri niðan beltið er hon sum fiskur og hevur sporl og roðslu. Vendir hon sær móti bátinum, tá ið hon kemur upp úr sjónum, verður óveður, og tá ræður um at rógva heim aftur sum skjótast og royna at sleppa undan at sjólátast. Men kemur havmaðurin upp hjá henni, verður gott veður. Havfrugvin syngur so fagurliga, at menninir verða óðir, tá ið teir lurta eftir sangi hennara, og tí eiga teir at stinga vattatumlarnar í oyruni, tí annars vilja teir í öði og örviti leypa úr bátinum út á sjógv til hennara.

Lesebok for ungdomsskulen.
1924.